gult cyan magenta svart

EG MEINI TAÐ

Veðrið

SJÓNARMIÐ
Sonne Smith

Tað hevur verið sjáldsama gott í vetur eftir eitt sjáld_ sama gott heyst, og ikki at gloyma tað besta summarið í mannaminni.

Nú hevur so verið ruskveður eitt skifti, og nú kunnu vit ikki lata vera við at knarra. Um ikki knarra, so ávirkar veðrið lagið á teimum flestu av okkum. Nøkur eru beinleiðis tung í huga av hesum f..... veðrinum. Tað er einki at gera við tað uttan at bíða, tí hyggur tú, kanska eitt sindur hugtungur, niður, so varnast tú, at tað er longu farið at spretta. Tær smáu blómurnar eru um at vakna úr sínum vetrardvala. Og ... vespurnar. Tær hava vit lukkuliga gloymt. Vit gloyma tær aftur beinanvegin, heilt til komið er hægst á summarið. Tá fara hesi snurrandi beistini aftur at arga beint fyri nøsini á okkum. Summi, kanska tey flestu, eru næstan paralyserað av skrekk. At hugsa sær, at bæði politistar og stórir og prúðir grindamenn skulu renna skríggjandi og nístandi undan einari flugu ... Men soleiðis er tað bara. Vit kunnu ikki gera við tað. Vespuræðslan er líka so ring at basa sum flograðsla.

Regn. Ja, hvat við tí? Eg gloymi ongantíð eina tilárskomna konu, sum segði, at føroysk konufólk hava so pena húð. Og tað var nettupp regnið, sum gjørdi tað. Kortini fara vit sjálvboðin undir solariið og lata okkum snerkja, til vit líkjast sviskum í skortinum. Hví gera vit tað? Leingist okkum suðureftir í tað góða veðrið?

Ið hvussu er og ikki. Vit leggja ikki petti í, um vit hava tað besta summarið í fleiri mannaminnir. Vit fara kortini suðureftir at fáa okkum sól. Mann er eisini so vakur sum til ber, tá ið mann kemur aftur og er ikki sørt errin av at síggja út, sum mann ger. Men tað má haldast við líka undir solarinum, til vit fara suðureftir næstu ferð. Altso eg meini ikki til Suðuroyar, men suðureftir á meginlandið. Kanska vinna vit eina ferð fyri tvey. Tað hevði nú verið ...

Sjálvur havi eg verið í tropunum nakrar ferðir. Til dømis í Kuba. Tað árið – 1998 – vóru avleiðingarnar av veðurfyribrigdinum el Nino ógvisligar. Grøðin miseydnaðist. Tað var eitt rættiligt rakár í Kuba. Og mitt í juli mánaði var hitabylgja í Kuba – í tropunum. Nei, nei. Eg lovaði, at eg skuldi ikki aftur knarra um veðrið í Føroyum og gleddi meg til at koma heimaftur. Kortini havi eg havt hug at knarra viðhvørt. Men hvørja ferð hugsi eg um ta ferðina til Kuba, sum sjálvsagt er ein uppliving fyri lívið.

Teir fátæku kubanararnir hava ongantíð verið uttanlands. Teir vita bara um sítt egna tropiska veður. Teir vita púra einki um veðrið í Føroyum. Tað kemur teimum als ikki til hugs. Og hví skuldi tað eisini tað. Kubanararnir hava nóg mikið at hugsa um í sínum andlits bókstaviliga sveitta.

Vit fáa einki gjørt við veðrið. Vit føroyingar. Ikki í námindum av Várharra. Tó eru vit so mikið væl fyri í okkara forkelaða ríkidømi, at vit kunnu altíð leita okkum hagar, veðrið er, sum vit vilja hava tað.

Gott at vit hava nakað veður yvirhøvur. Tí so hava vit okkurt at snakka um. Veðrið hjá okkum er so deiliga skiftandi, at vit hava alt møguligt at snakka um viðvíkjandi veðrið, tá ið tað ræður um at røkja okkum sjálv. Vit eru í aðrar mátar altíð spent at vita, hvussu veðrið verður, hvussu líkindini verða, um tað verður hoyterri, um tað slepst á flot, um tann, ið ætlar sær um sund og firðir, fær sjóverk, um vit tora í bát.

Veðrið er so vælsignað. Ein rík gáva. Vit fáa ikki verið veðrið fyri uttan.

So, nú brast hann á aftur. Ólukk í hetta f..... veðrið.

Var tað nakar, ið segði, at vit hava ikki brúk fyri veðrinum? Hóast vit hava bil?

Tað er altso fantastiskt. Vit laga bilin eftir veðrinum.

Vikuskifti

Postboks 19, 110 Tórshavn, telefon 311820, telefax 314720, teldupostur: birgir@sosialurin.fo
Blaðstjórn: Birgir Kruse

Jessy Dixon í kvøld

GOSPEL
Birgir Kruse

Í kvøld er høvi at hoyra Jessy Dixon í Norðurlandahúsinum. Fyrstu ferðina, eg varnaðist henda sangara, var á eini plátu hjá Paul Simon í 1974. Plátan er ein konsertupptøka, har umframt The Jessy Dixon Singers, eisini Suðuramerikanski bókurin Urubamba medvirkar. "Live Rhymin'" er heitið á plátuni, sum CBS gav út.

Jessy Dixon og hansara sangarar framføra á hesi plátu "Jesus is the answer" hjá Andrae Crouch. Eksalteraður, ektaður gospelsangur, sum var tað í eini kirkju í Harlem.

Plátan "Live Rhymin'" , sum Paul Simon gav út í 1974. Á plátuni medvirka The Jessy Dixon Singers



Langt frá hvítu skandinavisku traditiónunum, sum ofta ger seg galdandi á hesum øki.

Kendi gospelsangarin Andrae Crouch var á Gospelfestivalinum í 1997. "Tað er nokk tað størsta tiltakið, sum Føroya Gospeltónleikarafelag hevur sett sær fyri", sigur Vinjard Johansen, sum er formaður."So nú er langt síðani at ein kendur gospelsangari hevur verið í Føroyum", heldur hann fram. Vinjard væntar, at tey, ið leita sær niðan í Norðurlandahúsið í kvøld, fáa eitt upplivilsi fyri lívið.

Við á konsertini hjá Jessy Dixon verða eisini Siloakórið, VOX og United Voices. Tilsamans eini 80 føroyskar røddir afturat kenda, svarta amerikumannpinum og klaverleikara hansara.

Vinjard Johansen er formaður í Føroya Gospeltónleikarafelag, sum í kvøld skipar fyri gospelkonsert við Jessy Dixon og 80 føroyskum sangarum í Norðurlandahúsinum

Á súkklu

FRÍTÍÐ
Birgir Kruse

Úr Norðsjónum draga vit oftast fisk. Og eisini olju. Nú kunnu vit leggja frítíð og ítrótt afturat hesum landafrøðiliga øki. Tí nú verður lýst við súkkluferðum kring Norðsjógvin. Ikki er tað tí, at ein nýggj vatnsúkkla er í umfari. Nei, tað eru norðmenn, sum hava tikið stig til at merkja allar tær leiðir á landi, har súkklast kann kring Norðsjógvin. Tilsamans 6.000 kilometrar.

Á heimasíðuni www.northsea-cycle.com verður verkætlanin boðin fram til øll tey, sum hava hug at súkkla og halda frí á henda hátt. Merkta súkkluleiðin fer gjøgnum Noreg, Svøríki, Danmark, Týskland, Niðurlond, Ongland og Skotland. Eru heilsan og hugurin ikki til allan teinin eftir einum sumri, so ber sjálvandi til at taka hann í pettum. Og tá sagt verður, at súkkluleiðin er 6.000 kilometrar, eru ymsu ferjunar ikki tiknar við.

Hóast norðmenn eru uttanfyri ES, so er tað ein økismennandi ES-grunnur, sum í eitt trý ára skeið hevur fíggjað verkætlanina. Tilsamans 70 landspartar eru knýttir saman og vara av hesi ætlan, sum byrjaði á heysti í 1989.

Flestu vegir og stíggir, súkklast kann á kring Norðsjógvin, eru fyrndargamlir. Tí hevur fyrireikandi arbeiðið fyri mesta partin verið at merkja og upplýsa. Til tess at gera vart við verkætlanina verður nýggja norðsjóarsúkkluleiðin tó hátíðarhildin í Hamburg hin 5. mai. Tá verður leiðin "latin upp" og henda dag verður eisini ein stafettkapping á súkklu.

Ritstjóri og Náttarravnur á súkklu (Tekning: Óli P 1993)

MENNING. Tey journalistisku arbeiðsplássini eru smá her. Júst tí hava fólk, sum arbeiða á hesum øki, tørv á at hittast og skifta orð um fakligar journalistiskar spurningar, heldur Bodil Rahbek. Hon arbeiðir við menningarætlan í Útvarpinum og heldur, at Blaðmannafelagið átti at sæð tað sum sína uppgávu, at skipa fyri journalistiskum kjaki

Eitt forum til journalistiskt kjak, takk

SAMRØÐA
Birgir Kruse

Bodil Rahbek, sum er útbúgvin tíðindakvinna, er farin undir nýggja verkætlan fyri Útvarp Føroya.

"Verkætlanin snýr seg um persónliga og fakliga menning hjá programmfólkunum í Útvarpinum", sigur Bodil, sum er útbúgvin tíðindakvinna frá Danmarks Journalisthøjskole 1988.

"Tá talan er um menning, at dagføra sína vitan og gerast betur førur fyri at røkja sína uppgávu, so hugsa tey flestu helst um eftirútbúgving" sigur Bodil. "Men menning er eisini nakað, ið fer fram í dagligdegnum, í arbeiðsumhvørvinum, í samstarvinum við tey, sum eru á arbeiðsplássinum".

Bodil, sum er donsk, nýtir hugtakið "efter-uddannelse" og heldur tað upp móti hugsaðu orðunum "frem-uddannelse". "Eg kann siga, at henda verkætlanin heldur enn at snúgva seg um beinleiðis eftirútbúgving, í størri mun snýr seg um eina journalistiska tilbúgving", sigur Bodil Rahbæk.

"Í stóran mun snýr menning seg eisini um sannkenning og ásannan" sigur Bodil. "Tá eg sum fremmand komi uttan í frá og seti spurningar um, hvussu arbeitt verður, so verða fólk sett at arbeiða. At lýsa teirra dagliga virki, arbeiðslag og metodur, eins og egna arbeiðssituatión – alt hetta gevur oftast nýggjar sannkenningar. Og so er menningin jú longu sett ígongd".

– Hvussu roynir tú so at loysa júst hesa uppgávuna?

"Eg arbeiði við vegleiðing innan journalistiska yrkið. Men eg brúki eisini nógva tíð til at lurta og eygleiða, hvussu arbeitt verður á hesum staðnum, Útvarpi Føroya. Eg seti nógvar spurningar, men eg havi ikki svarini. Tey skulu fólkini á hesum staðnum sjálvi finna. Men tað, at eg eri til staðar, kann verða ein trygd fyri, at tíðin verður brúkt til at skifta orð og kjakast um journalistikk og journalistiska yrkið, um arbeiðsgongdir og um sjálvt handverkið", sigur Bodil Rahbek.

Ilt er at læra gamlan hund uppi at sita, sigur orðatakið og javnan síggja vit í bløðunum hvassorðaðar viðmerkingar frá miðlunum, tá onkur vil leggja seg út í arbeiðið hjá tíðindafólki og dittar sær at geva eitt boð uppá tíðindi og tíðindaflutning, sum kanska kundi verðið annaleiðis. Hetta tykist verða ein hørð verð, har eisini langt er millum kvinnuroddirnar.

Spurd um, hvussu programmfólk í Útvarpinum taka í móti henni, sigur Bodil Rahbek, at tey eru ómetaliga positiv. "Hetta eru jú engasjerað fakfólk, sum seta sær høg mál", sigir hon. "Hetta er heldur ikki ein málsligur ella tjóðskaparligur spurningur", sigur Bodil. "Journalistikkur er eitt handverk, og tey grundsjónarmið, sum øll arbeiða eftir, eru almenn og galda fyri allan heimin", sigur Bodil, sum tó skoytir uppí, at sjálvandi eru mentunarligir munir, sum tó mest koma til sjóndar í tí sniði, tú ber tíðindini. Í mátanum ella forminum. "Tað týdningarmesta hjá mær er, at virða henda munin", sigur Bodil.

"Føroyska Útvarpið skal ikki gera útvarp soleiðis, sum vit gera tað í danska útvarpinum. Sniðið er hvør sítt", sigur Bodil, sum áður hevur verið leiðari í eini verkætlan, ið fevndi um danskt og svenskt útvarpssamstarv. "Og tað ber væl til. Vit skulu bara finna eitt felags støði og semjast um, hvussu vit skulu gera tað. Konsensus er lyklaorðið".

– Hvat heldur tú um møguleikarnar fyri at mennast, hjá føroyskum tíðindafólki?

"Tey journalistisku arbeiðsplássini eru smá her. Júst tí hava tey fólk, sum arbeiða á hesum øki, tørv á at hittast í størri høpi, skulu tey skifta orð um fakligar journalistiskar spurningar", heldur Bodil.

"Blaðmannafelagið átti at sæð tað sum sína uppgávu, at tryggja eitt tílíkt høpi. At eitt forum er til journalistiskt kjak. Tað nýtast ikki at vera stór og kostnaðarmikil tiltøk, ein fer undir. Bara tað at hittast eina ferð um mánaðin og kjakast um eitt fakligt evni vildi ført nakað við sær. Og givið menning".

– Er tað yvirhøvur umráðandi hjá journalistum altíð at mennast og fylgja við? Er ein søga ikki altíð ein søga...?

"Tað er týdningarmikið hjá øllum at mennast í egnum starvi. Ikki bara hjá journalistum. Arbeiði yvirhøvur fyllir ómetaliga nógv í okkara lívi. Ikki bara mált í teirri tíð, vit eru til arbeiðis, men eisini í tí týdningi, arbeiði hevur fyri samleika okkara millum onnur menniskju", sigur Bodil, sum leggur afturat, at nógvar kanningar greitt vísa, at møguleikarnir fyri spennandi og mennandi uppgávum hjá fólki flest, hava eins nógv at týða og sjálv hin útgoldna lønin.

"Men hjá tíðindafólki og miðlunum yvirhøvur er tað alneyðugt at verða í støðugari menning, tí kappingin um hyggjarar, lurtarar og lesarar gerst alsamt harðari. Ein søga er ikki bara ein søga. Ein og hvør søga kann vinklast og sigast á ymsan hátt. Í nógvum útgávum og á nógvar ymsar mátar."

– Tað, sum vit kenna til í dag verður ofta yvirhálað av teknikki í morgin. Til dømis við internetinum. Sært tú tíðindi á internetinum sum eina spennandi avbjóðing hjá tíðindafólki?

"Sjálvandi. Vit vita, at miðlanýtslan broytist nógv í hesum tíðum. Internetið tekur nógv av teirri tíð, sum fólk annars brúka til at hyggja í sjónvarp og at lesa avísir. Útvarp hevur tann eginleikan, at tú kanst lurta eftir tí, meðan tú ert á netinum. Og sum miðil má ein verða til staðar, har sum viðskiftafólkini eru. Tað er klárt."

Hóast virksemið fyri Útvarp Føroya, er Bodil enn í starvi hjá danska útvarpinum, har hon í trý ár hevur verið redaktiónsleiðari í København Radio, sum deildin í høvuðsstaðarøkinum nevnist. Áður hevur hon arbeitt á trimum øðrum regionalum útvarpsstøðum og eisini hjá P1 í Danmarks Radio.

Tá Bodil í tíðarskeiðnum 1989-92 búði í Føroyum, var hon m.a. korrespondentur hjá tíðindastovuni Ritzau. Miðskeiðis í 90'unum skrivaði Bodil í trý ár fyri blaðið hjá donsku Juni rørlsuni, sum er ímóti ES-limaskapi. Seinastu árini hevur Bodil í stóran mun arbeitt við leiðsluspurningum.

Bodil Rahbek er útbúgvin tíðindakvinna frá Danmarks Journalisthøjskole í 1988 og hevur í trý ár verið redaktiónsleiðari hjá Danmarks Radio. Nú er hon farin undir nýggja verkætlan fyri Útvarp Føroya (Mynd Jens Kristian Vang)

Útvarpsmaðurin Helgi Jacobsen og Bodil Rahbek í Útvarpi Føroya (mynd Jens Kristian Vang)